# sismerki tjóðskaparliga



*Petur W. Háberg var ein sera fjølbroyttur maður, ið fylgdi væl við í føroyska samfelagslívinum*

fyri amtmanshúsunum, fólk sat og stóð á grótgørðunum, og børnini kluvu upp í trøini. Ein merkilig sjón hetta kvøldið. Eg minnist so væl, at amtmaðurin stóð úti á trappuni sjálvurannar. Tá ið svar amtmansins kom, og fólkið fekk varhugan av, at tað ikki var til vildar, var tað tætt við, at mannfjøldin stormaði amtmansborgina. Men Jóannes bóndi fekk sissað fólkið. Hann manaði tey til frið, spekt og sóma og bað tey koma oman á Tinghúsvøllin, har svarið frá Hilbert skuldi verða lisið upp. Amtmaðurin segði nakað sum so, at hann mótmælti, at føroysk skip skuldu nýta annað flagg enn Dannebrog, men hann mátti boyggja seg fyri bretsku myndugleikunum, eisini um teir áløgdu føroyskum skipum at sigla undir føroyskum flaggi. Dagin eftir, hósdagin 25. apríl, undirskrivaði Hilbert so kunngerð um nýtslu av føroyskum flaggi og BBC varpar út fleiri ferðir frásøgn um hitt føroyska flaggið, og hvussu tað sær út. Tá tyrptust fólk saman aftur, og frøin var stór. Eg minnist, hvussu kenslurnar yvirtóku Andrias Ziska, sum var ein av ítarstu merkismonnum. Dagin eftir var allur býurin flaggskrýddur, summastaðni vóru fløgg spent tvørtur um gøtuna.

Og eftir hetta hevur flaggdagurin verið hildin ár um ár í eina fjórðingsøld.

### Krossin til tjóðarmerki

Winston Churchill segði einaferð í sambandi við kríggið, at fimm ár eru ein long tíð í eins manns lívi. Og so satt tað er - hvat eru so ikki 25 ár! Tað er so mangt umskipað í hesi 25 ár. Hin ungi maðurin, sum las upp fundarsamtyktina undir Tinghúsinum 24. apríl 1940, hann situr nú sum ein gráhærdur maður í Føroya løgmansstóli. Og tá ið eg hyggi yvir mannfjøldina her, so má eg siga við Ingemann: "Slægten er ej mer den samme, dog det er det samme folk".

Tað er so mangan tikið til, at Norðurlondini øll hava valt sær krossin til tjóðarmerki. Fólk hava gjøgnum tíðirnar nýtt krossin til ymisk symbol. Krossurin verður m.a. nýttur til symbol upp á deyðan. Og tó eg haldi ikki, at hann átti at verið tað, so latið hann minna okkum á í dag, hvussu skjótt tíðin fer avstað, og at deyðin er menniskjans lutur. Tað gevur lívinum sítt sanna perspektiv. Michelangelo segði, at "Tað stígur ikki ein hugsan upp í sál míni, sum ikki deyðin er innristur í"

Og sum eg standi her og síggi fyri mær mannfjøldina frá 1940 og teir menn, sum gingu á odda bæði í flaggstríði og politikki, so gerst hetta krossins symbol ein álvarsamur veruleiki. Burtur er Hilbert, burtur ráðgevi hansara. Deyðir eru: Jóannes bóndi, Andrias Ziska, Andrass Samuelsen, Sverri Patursson, Louis Zachariasen, Thorstein Petersen, Tomm Nicolajsen. Og eg kundi hildið áfram. Leingi. Vit kundu eisini hugsað okkum, at henda mannfjøldin í dag gjørdi av at hittast aftur á Vaglinum um 25 ár. Tað skal ikki so nógv fantasi til at síggja fyri sær, hvussu tann skarin mundi sæð út.

Eg sat einaferð undir krígnum og lurtaði eftir Henrik Ibsens "Per Gynt" í útvarpinum. Har møtir so Per Gynt knappliga og óvæntað knappastoyparanum - deyðanum. Hann hveppir seg við deyðan, og hugsanin um, at hann skal gerast bert eitt fon uppi í einari størri heild - verða mold við øðrum orðum. "Det sætter min inderste sjæl i oprør". Og hetta er av sonnum eisini ein døpur hugsan, men eg kann minnast, at eg segði fram fyri meg : "Henrik Ibsen - tú gloymir eitt - tú gloymir uppstandilsins ljósa morgum".

Og hetta er krossins sanna symbol - lívið! Lív í yvirflóð. Lív upp úr deyðari mold. Ævigt lív og ljós eftir vetrarsins myrkur. Eins og náttúran hesar várdagar ber vitnisburð um lívsins vón. Nú tað blómar og grør í garði og ong. Nú tað grønkar í dølum, í brekkum og botnum. Nú ið fuglur og smálomb skapa lív og yndi í haga. Nú ið sólin mennist, vermir og lívgar. Nú ið boðskapurin hevur ljóðað um land okkara - um uppreisnina, krossins boðskapur um Kristi uppreisn úr deyðum - einasta vón og einasta lív mansins. Bleikrið so krossmerkið yvir okkum, og minni tað okkum um hesa sterku og óbroytiligu lívsins vón.

### Sigmund Brestisson

Tað eru næstan 1000 ár, síðan krossins merki á fyrsta sinni varð reist í Føroyum. Her stendur ein veldigur skótaflokkur. Tit gulu skótar - tit bera navn Sigmunds Brestissonar, og tit grønu skótar kenna allir málningin, ið hongur upp í KFUK, har Jógvan Waagstein hevur myndað Sigmund Brestisson , tá ið hann úti á Tinganesi boðaði kristnina á fyrsta sinni, og tá ið hann kanska droymdi um at vinna - sum tað plagdi at standa í samkomuhøll tykkara gráu skóta - Føroyar fyri kristusi.

Latið meg, áðrenn eg gevist, siga tykkum eina søgu um Sigmund Brestisson. Norski kongurin Ólavur Trygvason sendi boð eftir Sigmundi at koma yvir til Noregs. Tá ið teir hittust, helt kongurin fyri, at javnir vóru teir í kappleikum, eins og lívslagnur teirra høvdu verið ógvuliga líkar. Og nú vildi hann fegin siga Sigmundi frá hinum høga himnakongi, sum skapti allar lutir, og ynskti eftir, at sami alvaldandi Gud skuldi leiða hann til sanna trúgv og til at tæna sær. Føroyingasøga greiðir frá, at Ólavur lovar Sigmundi vinskap sín, "hóast hetta" sigur hann "er einki vert móti teirri sømd og sælu, ið almáttugur Gud man geva tær, sum hvørjum manni, ið goymir boðorð hansara í heilaga andans kærleika. At ráða saman við sínum søta Soni, ið er kongur yvir alla kongar, ævinliga í Himmiríks dýrd".

Sigmundur svarar, at hann hevur ongantíð blótað skurðgud - ongantíð ofrað til avgudarnar eftir heidna manna siði, tí at hann longu tá sá, at tann siður dugdi einki - hóast hann ongan betri visti. Men hetta sum kongurin boðaði, var so vakurt og yndisligt, at hann beinanvegin tók við tí.

Hann fekk ikki góða móttøku á tingi og mangt av tí, sum seinni hendi í hesum sambandi, kann kanska fáa okkum at ivast í, hvussu væl hann hevði fingið fatur á kristindómsins grundsannleikum. Men hetta var so fyrstu ferð, ið krossins boðskapur ljóðaði í Føroyum. Tað eru reiðiliga 965 ár liðin síðan hetta fór fram, og tá vóru gingin umleið 965 ár síðan krossfestingin á Golgata var farin fram. So Sigmundur stendur við upplyftum krossi miðskeiðis millum hini páskini, tá ið krossurin fekk sín velduga týdning - og okkara tíð.

Og yvir landinum bleiktrar hetta sama krossmerki í dag. Føroyingar syngja í tjóðsanginum: Eg nígi tí niður í bøn til tí Gud, hin heilagi friður mær falli í lut! Og krossurin í flagginum fellir hvørjum einstøkum í lut, sum tekur við krossins friðar- og fagnaðarboðskapi.

## Petur William Háberg



Petur William Háberg varð føddur í Havn 31. august 1914, foreldrini vóru Malla, f. Petersen, og Napoleon Joensen.

Petur vaks upp í Havn og gekk í barnaskúla og realskúla, har hann tók avgjørda og varandi støðu til rættin hjá móðurmáli okkara í samfelagnum.

Liðugur við skúlan kom hann at arbeiða hjá Tórstein Petersen sakførara, og í hesum arbeiði hevði hann gott høvi at fylgja við í føroyskum samfelagslívi. Seinni fór hann at arbeiða hjá Jens av Reyni í P/F Tór.

Petur W. Háberg var skrivandi maður og skald. Við sínum holla kunnleika í føroyskum máli saman við einum leikandi løttum penni var hann ein dyggur stuðul í brøðrasamkomuni, har hann skrivaði, talaði, yrkti og umsetti nógvar sangir, eins og hann gjørdi eitt stórt ungdómsarbeiði.

Saman við svágrinum, Jens Christian Christiansen (Kissa) gav hann fleiri bøkur út á Norrøna Forlagnum. Eisini róku teir bilasøluna Norrøna.

Undir krígnum fekk hann hugskotið til Barnahjálpargrunnin, sum hann stovnaði saman við Kissa, Ludvík Breckmann og øðrum. Hetta var eitt av hansara hjartamálum.

P/F Dagblaðið gav í 1981 út bókina "Hugbirtingar", ið var ein greinarøð hjá Peturi Háberg í Dagblaðnum árini 1976-77. Hesa bókina fekk hann M.A. Jacobsens virðisløn fyri.

Í Havn var hann í fleiri nevndum, sum t.d. líkningarnevndini og gøtunavnanevndini. Seinnu árini arbeiddi hann sum reiðari í fiskivinnufyritøkuni Hvalnes.

Petur var giftur Hjørdis, f. Næssaa, sum í dag er 88 ára gomul. Børnini hjá teimum eru: Beinta, Erna, Jógvan Páll, Elma, Pætur og Malan.

Petur Háberg andaðist 25. oktober 1984, 70 ára gamal.